

**Óli Jacobsen**
*olijacobsen@post.olivant.fo*



*Símun Johan og Marjun komu bæði av Trøllanesi. Systkinabarnið Finnbogi Ísakson er komin at vitja Rosenmeyer beiggja Símun Johan. Húsini omanfyri vegin er Uppistova, Húsini longst burtur er Útistova haðani Marjun er ættað. Hesumegin Uppistovu er Innistova, haðani tann sum skrivar hesar reglur er ættaður*
*Mynd: Ása Justinussen*

## Mentunarsetur í Saltnesi

Skúlin í Saltnesi var eitt mentunarsetur. Har var nógv sungið av kingosálmum, og dugdi pápi nógvar kingosálmar. Mamma og hann kundu syngja mangan sálmin uttan at opna bók. Bara harmiligt, at tað ikki varð tikið uppá band. Men tað er nú so, at tað, sum er so dagligt fyri ein, hugsar ein ikki um, fyrr enn tað er ov seint.

Umborð á sluppini Gudrun KG 243 var eitt skriftstað, sum var skorið í eina fjøl og stóð í lugarskylettinum. Tað var á donskum, sum vanligt var fyrr í tíðini og var úr Sálmi 50, ørindi 15: »Kald på mig på nødens Dag, og jeg vil udfri dig, og du skal prise mig«.

Pápi tók ofta til hetta skriftstaðið, sum hevði verið honum og mongum til hjálpar og troyst, tá ið á stóð. Hann var við »Gudrun« um summarið, sum hann fylti 68 ár og hevði hann tá verið á sjónum í 50 ár.

Skal eg annars seta eina yvirskrift yvir foreldur míni, so má hon vera, at tey vóru nøgd og glað.«

Símun Jóhan var ein av oddamonnunum í brøðrasamkomuni »Mizpa« alla sína tíð, og tað, sum eyðkendi hann her var trúfesti. Hann hevði orðið í síni makt, og tað var avgjørt eingin, sum sovnaði, tá hann hevði orðið.

Hann talaði á samfelagsmøtum longu, tá ið hann var 15 ára gamal. Hóast hann var greiður og avgjørdur í trúarmálum, so var hann eisini tollyntur mótvegis øðrum og kundi tí saman við øllum.

## Fann konuna í sama túni

Í 1956 giftist Símun Jóhan við Marjun. Hann fór ikki so langt eftir konu. Honum longdist altíð aftur til Trøllanesar og kom eisini ofta norður aftur á slóðina. Marjun er ættað úr Útistovu, sum er eitt av teimum trimum »gomlu« húsunum á Trøllanesi. Tey bæði eru tískil ættað úr sama túni.

Marjun er eisini av góðum bergi brotin. Langabbi hennara var Absalon Guttormsson, sum var eitt av okkara stórmennum frá seinna partinum av 19. øld. Absalon gjørdist millum annað kendur sum fráhaldskempa og sum íðin føroyingafelagsmaður. Hóast tað eru 100 ár, síðan hann doyði, merkist hansara ávirkan framvegis í Mikladals sókn, har Trøllanes er ein partur.



*Her er Símun Jóhan á einum donskum eftirskúla við einum nemingi. Símun Johan var komin á skúlan at vísa, hvussu ein føroyskur bátur varð bygdur*

Óli, sonur Marjun og Símun Jóhan, hevur skrivað eina áhugaverda ritgerð í Varðanum um oldurabban.

Foreldrini hjá Marjun vóru Asta, ættað av Eiði, og Absalon Østerø

Marjun og Símun Jóhan vóru mótsetningar, sum ofta er hjá hjúnum. Meðan Símun Jóhan kanska var tann meira forti, so er Marjun tann hóvliga, men hon kann nú eisini siga, hvar skápið skal standa.

Tey fýra børnini hjá teimum eru: Jóhanna Oluffa, gift Bárði Ljósheim, Asta, gift við Torleif Eiðisgarð, Óli, giftur við Leu Øregaard og Absalon, giftur við Jórun á Roykheyggi

## Gav ikki upp fyri bakkasti

Fyri 10 árum árum síðan hendi nakað, sum kom fullkomiliga at broyta lívið hjá Símuni Jóhan. Hann hevði smíðað bát nr. 143 ella reiðiliga tað, tá hann fekk apopleksi, so hann lammaðist í høgru lið. Hetta var eitt rættiligt bakkast.

Men hann fall ikki í fátt. M.a. fór hann at skriva á teldu. Hann kundi bert nýta vinstru hondina og ein fingur at skriva við, so tað gekk ikki skjótt. Men drúgt er tað, sum dryppar. Tað er undir hesum umstøðum, at hann skrivaði nógvar av frásøgnunum í FF-blaðnum.

Millum hesar frásagnir er eisini bátasøgan á Eiði, sum fylti fýra síður í trimum FF-bløðum. Her sást eisini, hvussu gott minni Símun Jóhan hevði. Henda frásøgnin er eitt gott íkast til Eiðis søgu eins og til okkara bátasøgu.

Símun Jóhan helt seg heldur ikki aftur at fara út millum fólk. Við sínum elektriska koyristóli fór hann runt í bygdini, har hann eisini framvegis vitjaði fólk. Hann var altíð vælkomin, har hann kom við sínum framvegis lætta lyndi. Símun Jóhan luttók í øllum bygdarlívi og fór til tey tiltøk, sum hann slapp til. Hann var eitt fyridømi fyri tey, sum koma soleiðis fyri, og hann prógvaði, at var viljin til tess, kundi lívið gerast hampiliga gott.

Men hetta var eisini takkað veri Marjun og hennara. Tey hava á ein fyrimyndarligan hátt gjørt sítt til at lætta um hjá Símun Jóhan, so hann sum minst varð darvaður av sínum breki.

Seinastu tíðina var tað greitt, at tað gekk aftur á hjá honum. Men hann fekk so nógv burtur úr sínum lívi, sum hann kundi fáa.

## Báturin hjá Símun Jóhan varðveittur

Tíbetur er tryggjað eftirtíðini, at júst »bátamodellið« hjá Símuni Jóhan er varðveitt. Hann lat sítt kynstur til ein ungan kollfirðing Terja Reinert Jacobsen. Símun Jóhan var ofta í Kollafirði og legði sínum »nemingi« lag á, og sigst hetta at hava riggað væl. Ein dagin kom ein maður til Óla hjá Símun Jóhan, og segði, at hann helt seg heilt vist hava sæð ein nýggjan bát hjá Símun Jóhan. Men hann fekk tað ikki at passa, tí Símun Jóhan hevði ikki smíðað bátar í nógv ár. So væl hevur Símun Jóhan dugað at lært frá sær!



*Foreldrini hjá Símun Jóhan vóru Elspa og Óli Wolles*

## Gestablítt hús

Síðan undirritaði byrjaði at koma til Eiðis fyri um 30 árum síðani, hevur ein túrur inn í Miklagarð altíð verið ein fastur partur av »rutuni«. Hetta var altíð hugaligt, tí Símun Jóhan visti altíð okkurt. Tað visti Marjun eisini, og altíð er hon kvik við drekkamunninum.

Í Miklagarði hevur altíð verið eitt sera gestablítt hús. Her hevur verið hjartarúm, so tað munar. Hjá teimum er altíð komið nógv fólk. Ættirnar í bæði borð eru stórar, og tey komu ofta á vitjan. Tá fremmandafólk komu í møtisørindum, var farið inn í Miklagarð. Har komu eisini onnur. Ein danskur lækni, sum javnan kemur til Eiðis sum avloysari, kendi seg skjótt heima hjá Marjun og Símun Jóhan.

Seinastu ferð eg hitti Símun Jóhan var eisini serlig vitjan av einum dana. Hann hevði ligið á sjúkrahúsi í Danmark í 1971 saman við Símun Johan. Nú var hann komin til Føroya saman føroyskum kunninga, sum eisini kendi Símun Jóhan.

Men so góð minnir hevði hesin danin um Símun Jóhan, at hann vildi vitja hann, hóast Símun Jóhan tá ikki hevði sama førleika at samskifta, sum hann annars hevði verið so óførur til. So væl hevur Símun Jóhan dugað við fólki, at hann var ikki gloymdur sjálvt eftir nærum 40 ár.

Símun Jóhan fekk eisini eina stórsligna jarðarferð. Tey vóru nógv sum vildu vísa hesum megnarmanni tann seinasta heiðurin, sum hann eisini hevði uppiborið.

Í komandi tveimum pørtum verða frásagnir hjá Símun Jóhan. Aftaná verða tveir partar um Poul Müller, kolonistjóra í Grønlandi